# Tangavirkið 75 ár á baki




*Tangavirkið rundar tey 75 árini í hesum døgum*

**Í hesum døgum rundar eitt gamalt virkið í Vági tey 75 árini og 3. ættarlið hevur tikið við. Tangavirkið fyllir 75 ár og virksemi hevur verið øll árini, síðani Palli Mortensen, Argja Palli, legði lunnar undir virkið**

VINNA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*
*Myndir; Finn Johannesen/ Dagfinn Olsen*

Tangavirkið í Vági rundar tey 75 árini í hesum døgum og í hesum sambandi hevur virkið móttøku tann 23. februar.

Tað var Palli Mortensen, nevndur Argja Palli, ið legði lunnar undir virkið. Hann flutti til Vágs í 1932, men longu í 1928 varð heitt á hann um at koma suður at hyggja at einum motori, ið skuldi setast í stand. Hetta arbeiði megnaði hann til fulnar, og tí spurdi Magnus Dahl, um hann vildi koma í Garðasmiðjuna at arbeiða. Eftir tríggjar vetrar byrjaði hann so sítt egna virksemi, sum hevur hildið á til í dag.

Virksemið hevur verið støðugt, men av skiftandi slag.

Virksemið byrjaði við umvæling av súklum og øðrum smiðjuarbeiði.

Krígsárini høvdu hópin av umvælingum av motorum við sær og eftir kríggið, umleið 1946, bleiv ein korvett umbygd til trolara. Arbeiðið var liðugt á summri 1947 og nevndist skipið Rodni.

Í 1950 var kreppa, og bleiv tá farið undir at leggja sentralhita í hús.

Í 1961 varð farið undir at framleiða føroyskar ketlar og hetta helt fram til 1978, tá farið varð undir at gera oljutangar og er hetta ein av stóru framleiðslunum ídag, og hesir eru sjálvandi góðkendir.

### Ættarskifti

Eftir fleiri ár, bleiv so fyrsta ættarliðskiftið í Smiðjuni hjá Argja Palla, tá ið sonurin Bent tók yvir arbeiðið, og bleiv smiðjan kallað Smiðjan hjá Bent. Nú vit skriva 2007, hevur triðja ættarlið tikið við og stjórnast fyritøkan nú av Mortan Mortensen.

Um aldarmótið byrjaði Tangavirkið eisini handil, har útsøla er av baðirúmstilhoyri, rørum, fittings, og annað, ið hoyrir til virksemið.

nógv specialarbeiðir umbiðin norðanfjørs. Eitt nú stálkonstruktiónir, flutingstangar og besløg til alivinnuna, umframt teir góðkendu oljutangarnir, ið verða seldir kring allar Føroyar.

Hóast nógv ár eru liðin síðani virksemið byrjaði, og hóast svárar krepputíðir, so hevur smiðjan altíð hórað undan, og hevur í dag staðfest sítt virksemi.

Á Tangavirkinum starvast 13 fólk, herav eru 4 lærlingar. Eisini er eitt fólk á skrivstovuni og eitt í handlinum.

Mortan Mortensen, stjóri, heldur, at útlitini eru sera bjørt, tá ein hugsar um flutningssambandið um Suðuroyarfjørð er munandi betrað, og at í næstum skulu byggjast bæði skúli og ellisheim í oynni. Við hesum sær framtíðini ljós út.

– Men tað, ið eisini er sera gott fyri eina fyritøku sum okkara er, at kundar norðanfjørðs umbiðja alt fleiri og fleiri arbeiðir, tí teir vita, at vit kunnu veita eina góða vøru til ein góðan prís, sigur Mortan Mortensen.



*Eittnú serligir flutningstangar til alivinnuna eru partur av framleiðsluni á Tangavirkinum*



*Gomul mynd úr Vági, ið vísir Smiðjuna hjá Argja Palla*

## FAKTA

Tangavirkið (Smiðjan hjá Argja Palla, Smiðjan hjá Bent).

Palli Mortensen flutti til Vágs í 1932 og byrjaði smiðju.

Smiðjuarbeiðið í høvðusheitum:
- stálarbeiði
- góðkendir oljutangar
- alminum, rustfrítt arbeiði
- umvælingar
- vanligt smiðju arbeiði
- hita og sanitet
- hydraulik
- besløg til alivinnuna
- serligir flutningstangar til alivinnuna
- ymisk hús til el, spøl oa.



*Mortan og Bent Mortensen, tvey ættarlið á Tangavirkinum*

# Eik letur upp ungdómsbanka í Havn



**Fyri fyrstu ferð í Føroyum letur ein banki upp eina ungdómsdeild, ið bert er fyri tey, sum eru millum 18 og 25 ár. Tænastur, ráðgeving, tiltøk, kundaráðgevar og høli eru skræddaraseymað til ung í Føroyum. Deildin hjá Eik letur upp í dag, og opið hús verður frá kl. 15 – 17**

BANKI
*Eirikur Lindenksov*
*eirkur@sosialurin.fo*

Nú verður øðrvísi at fara í bankan!

Í dag letur Eik upp eina ungdómsdeild, ið tekur sær av bankaørindum og ráðgeving til teirra, sum eru millum 18 og 25 ár. Hetta er fyrsta bankadeildin av sínum slag í Føroyum, og hon er skræddaraseymað til ung.

Ungdómsdeildin er á Tinghúsvegi 49, beint yvir av SMS.

- Ráðgevararnir á ungdómsdeildini eru ungir og duga væl at seta seg inn í støðuna hjá teimum ungu. Ert tú millum 18 og 25, og hevur tú brúk fyri at gera álvara av avbjóðing og dreymum, er hetta deildin fyri teg. Eik-deildin fyri ung hjálpir tær at fáa gongd á tínar ætlanir og hevur eisini eina røð av tænastum, t. d. ungdómslán og lestrarkreditt, eins og góða ráðgeving um uppsparing og íløgur, sigur Eik í tíðindaskrivi.

Deildin er innrættað av nýggjum og líkist í grundini ikki einum banka. Í Eik vóna tey, at tey ungu skulu kenna seg meira heima á nýggju deildini enn á øðrum bankadeildum og í øðrum bankum.

Eingin avgreiðslukassi er, men í staðin er ein sjálvtøka og tvær teldur, har tú sjálv/ur fært avgreitt tíni bankaørindi.

Spennandi tiltøk verða ánýggju ungdómsdeildini í vár. Fyrstu tiltøkini eru hesi: »Ung & uppsparing«, »Lærlingar & pengar« og »Ung & íløgur«.

- Á móttøkuni í dag hevur tú kjansin at síggja deildina, heilsa upp á ráðgevarnar, hoyra tónleik, fáa okkurt lekkurt at eta og annars hitta fólk.

Tey fyrstu 160, sum eru í aldrinum 18-25 ár, fáa hvør sítt atgongumerki til frumsýningina av filminum »Ghost Rider« í Havnar Bio, sigur Eik.